Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 31.10.2024 kl. 16:30 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | Magnus Skoralíð |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 55/24 | 24/00113-7 | Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 169 á Havnalagnum í Leirvík við Lugarið | 3 |
| 56/24 | 24/00374-4 | Umsókn um marknaumskipan - Matr. nr. 159 SG | 5 |
| 57/24 | 24/00598-3 | Umsókn um broyting av býarplani - matr. nr. 2 við Gøtugjógv | 6 |
| 58/24 | 24/00610-2 | Ummæli um marknaðarumskipan - at leggja part av matr. nr. 12a aftrat matr. nr. 5 við Gøtugjógv | 7 |
| 59/24 | 24/00614-5 | Broytingar í býarplani í Syðrugøtu | 8 |
| 60/24 | 24/00613-2 | Gongugøta millum Syðrugøtu og Gøtugjógv – matr. nr. a. | 10 |
| 61/24 | 24/00633-1 | Skúlin í Leirvík - matr. nr. 422a LV - Útbjóðing | 11 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 55/24 Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 169 á Havnalagnum í Leirvík við Lugarið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 23.10.2024 | 8/24 | 24/00113-7 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.10.2024 | 39/24 | 24/00113-7 |
| 3 Býráðið | 31.10.2024 | 55/24 | 24/00113-7 |

**Málslýsing:**

Serstøk byggisamtykt er gjørd fyri havnaøkið við Lugarið matr. nr. 169a í Leirvík. Økið liggur í einum C2 økið. Umsitingin hevur arbeitt við at gera eina serstaka byggisamtykt, ið hóskar til umhvørvið.
Í stuttum, so inniheldur serstaka byggisamtyktin møguleikar til bygging av bústøðum og annað útatvent virksemi í niðari hæddini, so sum kafé, handil o.a., umframt hæddarviðurskifti, frástøðu til mark (byggilinjur) v.m.

Víst verður til skjøl í málinum.

**Vinnunevndin 22. november 2023**
Málið er tikið av skrá

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. november 2023**
Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti 23.10.2024**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við at gera tillagingar í serstøku byggisamtyktini á matr. 169a í havnalagnum við Lugarið í Leirvík.

Sí skjøl í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at samtykkja serstøku byggisamtyktini fyri havnaøkið við Lugarið matr. nr. 169a í Leirvík

**Ískoyti 23.10.2024**

| |
|---|
| Umsitingin mælir til, at samtykkja serstøku byggisamtyktini fyri havnaøkið við Lugarið matr. nr. 169a í Leirvík |

**Vinnunevndin 23. oktober 2024**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. oktober 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 31. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi- og býarskipanarnevndin.

## 56/24 Umsókn um marknaumskipan - Matr. nr. 159 SG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.10.2024 | 40/24 | 24/00374-4 |
| 2 Býráðið | 31.10.2024 | 56/24 | 24/00374-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 13. mai 2024 har søkt verður um tillaging av matrikkul 159 í Syðrugøtu. Umsøkjarin biður um eina marknaðarumskipan millum matr. nr. aa og matr. nr. 159.<br><br>Umsøkjarin ynskir at keypa áleið 54 m2 afturat matr. nr. 159 og letur áleið 8 m2 til matr. nr. aa av verandi ogn.<br><br>Matr. nr. aa er ætla til veg hjá Eysturkommunu.<br><br>Umsóknin er í andsøgn við ásetingarnar í §17 Í løgtingslóg nr.64 frá 11. Desembur 1962 um matrikulering og sundurbýtið, harumframt eru tillagingin er í andsøgn við býarplanin fyri Eysturkommunu, tí hetta gongur frá øki B - Bústaðarøki og til øki H – Frílendi.<br><br>Matr.159 liggur í B-øki og tann parturin umsøkjarin ynskir at keypa liggur sum H-Frílendi á einum matrikli sum er lagdur av til kommunalan veg.<br><br>Samb. §.20 kann býráðið geva undantaksloyvi við at býarplanurin verður broyttur aftaná, at umskipanin av matriklinum er framd.<br><br>Sí Skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 15.000,- kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir frá, at gera hesa broyting, tí at hetta er í andsøgn við býarplanin og vegakervi fyri Eysturkommunu. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. oktober 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 31. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndin.

## 57/24 Umsókn um broyting av býarplani - matr. nr. 2 við Gøtugjógv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.10.2024 | 41/24 | 24/00598-3 |
| 2 Býráðið | 31.10.2024 | 57/24 | 24/00598-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 8. oktober 2024 har søkt verður um at broyta part av býarplaninum fyri matr. nr. 2 við Gøtugjógv frá at verða H-frílendi til B-bústaðarendamál.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 15.000,- kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at gera hesar broytingarnar í býarplaninum við Gøtugjógv. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. oktober 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir tilmælinum í umsitingini.

**Býráðið 31. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndin.

## 58/24 Ummæli um marknaðarumskipan - at leggja part av matr. nr. 12a aftrat matr. nr. 5 við Gøtugjógv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.10.2024 | 42/24 | 24/00610-2 |
| 2 Býráðið | 31.10.2024 | 58/24 | 24/00610-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 10. oktober 2024 frá Búnaðarstovuni, har heitt verður á kommununa, um at ummæla eitt keyp av uppískoytisstykki av festinum matr. nr. 12a at leggja aftrat matr. nr. 5 við Gøtugjógv.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at samtykkja ummæli til Búnaðarstovuna. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. oktober 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum við tí viðmerking, at vegurin verður tikin úr og latin Eysturkommunu.

**Býráðið 31. oktober 2024**
Málið tikið av skrá.

## 59/24 Broytingar í býarplani í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.10.2024 | 45/24 | 24/00614-5 |
| 2 Býráðið | 31.10.2024 | 59/24 | 24/00614-5 |

**Málslýsing:**

Í samband við at Eysturkommuna hevur samtykt at selja part av matr. nr. 215a at leggja aftrat matr. nr. 215g í Syðrugøtu er neyðugt at broyta býarplanin.

Broytingin fevnir um at víðka øki "B - Bústaðarendamál" við matr. nr. 215g í Syðrugøtu.

Sí kortskjal:

- 241016_BS_EK-215a

Haraftrat mælir umsitingin til, at tillaga býarplanin soleiðis:

Øki "B - Bústaðarendamál" á matrikul 94b og 124 í Syðrugøtu, verða broytingar framdar í býarplanin í almennu byggisamtyktini.

Øki "B - Bústaðarendamál" við litra p. í Syðrugøtu, verða broytingarframdar í býarplanin í almennu byggisamtyktini.

Sí kortskjøl:

- 241016_BS_EK - 94b
- 241016_BS_EK - Litra n
- 241016_BS_EK - Litra p

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, gera hesar broytingarnar.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. oktober 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 31. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 60/24 Gongugøta millum Syðrugøtu og Gøtugjógv – matr. nr. a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.10.2024 | 44/24 | 24/00613-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.10.2024 | 39/24 | 24/00613-2 |
| 3 Býráðið | 31.10.2024 | 60/24 | 24/00613-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Vísandi til fund hjá Umhvørvis- og trivnaðarnevndin 23. apríl 2024 varð mælt til, at bjóða gøturnar millum Syðrugøtu og brúnna út og frá bilverkstaðnum og til Losjuna út og brúka avsettu pengarnar uppá 1 mió. til hetta.<br><br>Umsitingin hevur arbeitt við at fáa projekt uppá gøtuna millum Syðrugøtu og brúnna.<br><br>Um hetta arbeiði skal setast í verk, er neyðugt við einari býráðssamtykt.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við at gera gøtuna millum Syðrugøtu og brúnna. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. oktober 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 28. oktober 2024**
Fíggarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 31. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 61/24 Skúlin í Leirvík - matr. nr. 422a LV - Útbjóðing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 28.10.2024 | 40/24 | 24/00633-1 |
| 2 Býráðið | 31.10.2024 | 61/24 | 24/00633-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Skúlin í Leirvík verður klárur at bjóða út fyrst í november. Býráði hevur samtykt, at hetta skal bjóðast út sum innboðin licitatión og høvuðsarbeiðstøka.<br><br>Eysturkommuna skipaði fyri framløgu, har lokalir arbeiðstakarar fingu høvi at síggja verkætlanina. Ætlanin við framløguni var, at lokalu fyritøkurnar skuldi fáa møguleika, at gera eina metan av, um teirra fyritøka hevði tekniska, arbeiðs- og fíggjarliga orku at standa fyri hesi verkætlan. Eingin av fyritøkunum mettu seg føran fyri, at standa fyri hesari verkætlan.<br><br>Vit hava verið í samband við 6 fyritøkur, ið eru mettar at hava tekniska, arbeiðs- og fíggjarligu orku til verkætlanina. Sí skjal í málinum.<br><br>Útbjóðingartilfarið verður tøkt í seinasta lagi 1. november 2024 og verður lagt í Dalux. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at bjóða arbeiði út til nevndu arbeiðstakarar í hjálagda skjalið. |

**Fíggjarnevnd 28. oktober 2024**
Fíggjarnevndi mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitngini.

**Býráðið 31. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

fundurin lokin 18.00

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen